ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Sama um tit valdu meg ella Obama á uppstillingarvalinum, eiga tit at velja Obama til forseta. Tað geri eg*

*Hillary Clinton*

# Barrack Obama er mítt valevni

**Hillary Clinton royndi tíðliga í morgun at sannføra sínar veljarar um, at teir eiga at atkvøða fyri Barrack Obama**



*Hillary Clinton bað sínar stuðlar stuðla Barrack Obama*
*Mynd: Polfoto*

- Sama um tit atkvøddu fyri mær, ella um tit atkvøddu fyri Barrack Obama, so er tíðin nú komin, til at vit ganga saman í eina eind. Vit eru á sama liði, og eingin kann loyva sær at standa úti á síðulinjuni. No way, no how, no McCain.

Meiri fekk Hillary Clinton ikki sagt, tí teir túsundtals demokratarnir vóru eftir øllum at døma ovurfegnir um orð hennara. Men sambært eygleiðarunum kann røða hennara eisini fáa sera stóran týdning fyri úrslitið hjá Barrack Obama í novembur. Kanningar hava víst, at nógvir veljarar hjá Hillary Clinton hava ilt við at styðja Obama, og tí var røða hennara í morgun ein roynd at sannføra sínar egnu stuðlar um, at nú er tað Obama, teir skulu styðja. Tí tað ger hon.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at Hillary Clinton tóktist sinnilig og orkufull samanborið við ta tyngdu og útlúgvaðu kvinnuna, sum tapti uppstillingarvalið fyrr í summar. Men tað var eisini júst ta myndina, hon skuldi vísa fyri at sannføra sínar stuðlar um, at ósigurin í uppstillingini er søga, og at tað nú snýr seg um at fáa Barrack Obama í Hvítu Húsini.

# Álopið á Azizabad kostaði 60 børnum lívið

**ST sigur seg hava fingið prógv fyri, at eitt loftálop á eina afghanska bygd seinasta fríggjadag kostaði 90 sivilfólkum lívi. Tey flestu vóru børn**

Tey fyrstu tíðindini um álopið komu frá afghonskum keldum, og tá ljóðaði, at 78 sivilfólk vóru deyð í álopinum, sum flogfør undir amerikanskari leiðslu gjørdu á bygdina Azizabad, sum er í Herat-landspartinum. Tær afghonsku keldurnar vildu vera við, at millum tey deyðu vóru 50 børn.

Síðani hevur ST kannað málið, og í einari frágreiðing skrivar norski ST-sendimaðurin í Afghanistan, Kai Eide, at ST hevur fingið prógv fyri, at álopið kostaði umleið 90 sivilfólkum lívið. Hann skrivar eisini, at talan var um umleið 60 børn, 15 kvinnur og 15 menn.

Sambært Aftenposten skrivar Kai Eide í sínum viðmerkingum til frágreiðingina, at álop sum tað á Azizabad fáa afghanska fólkið at missa álitið á teimum útlendsku herdeildunum í landinum, og tey hava tí heldur ikki álit á teimum, sum siga seg virka fyri at endurreisa lóg og landaskil, skrivar hann.

Útlendska herleiðslan í Afghanistan segði seg í gjár hava fingið vissu fyri, at fimm sivilfólk og 30 uppreistrarmenn høvdu latið lív í álopinum. Samstundis hevur amerikanska herleiðslan í Afghanistan sagt, at endamálið við álopinum var at beina fyri einum uppreistrarleiðara, og at tað eydnaðist.



*Hesin smádrongurin í Azizabad slapp við lívinum*
*Mynd: AFP*

STUTT SAGT

## Markus Aurelius í Turkalandi

Í einum útgrevstri í Turkalandi hava belgiskir fornfrøðingar funnið partar av einari standmynd av tí gamla rómverska keisaranum Markus Aurelius. Tey serkønu halda, at standmyndin hevur verið 4,5 metrar høg.

Markus Aurelius, sum ráddi í Rom frá 161 til 180 eftir Kristi føðing, verður roknaður sum tann seinasti av teimum góðu, rómversku keisarunum og sum ein av teimum fremstu heimsspekingunum um tað mundið.

Standmyndin er funnin í Salagassos, sum er har vesturi í Turkalandi, og á sama staði hava fornfrøðingar fyrr funnið eina standmynd av keisaranum Hadrian. Her var ein rómversk baðstova, men hon varð løgd í oyði í einum jarðskjálvta í sjeyndu øld. Higartil hava teir belgisku fornfrøðingarnir funnið høvdið og høgru hond, og leitað verður eftir hinum pørtunum.



*Markus Aurelius var rómverskur keisari*
*Mynd: AFP*

## Krevja Samak frá

Fleiri túsund fólk vóru í gjár í gøtunum í teilendska høvuðsstaðnum Bangkok, har tey kravdu, at forsætisráðharrin, Samak Sundaravej, og stjórn hansara skulu fara frá alt fyri eitt.

Mannamúgvan kringsetti stjórnarbygningin í Bangkok og teir almennu fjølmiðlarnar, og tíðindastovurnar skriva, at nógv almenn starvsfólk valdu ella noyddust at fara til hús.

Mótmælisfólkið vildi vera við, at Samak Sundravaj er ikki annað enn ein skutilssveinur hjá fyrrverandi forsætisráðharranum Thaksin Shinawatra, sum hevur búð í útlegd, síðani hann bleiv koyrdur frá.